# ...við høgari dygd

Um tú hevur áhuga í klassiskari myndlist, har tú sært, hvat listarverkini ímynda, er Listasafn Íslands staðið at vitja. Hetta savnið hevur verk hjá teimum allarbestu íslendsku listarfólkunum. Listasafn Reykjavíkur er eitt nýtt savn, sum liggur í miðbýnum við ráðhúsið og hægstarætt. Her eru nógvar sýningar á høgum, altjóða støði. Millum annað hevði kendi íslendski listarmaðurin, Ólafur Eliasson, eina stóra sýning fyri nøkrum árum síðani. Eitt heilt nýtt savn er Landnámssýningin, sum er bygt oman yvir eina ruin av einum langhúsi, ið varð funnið í sambandi við útgrevstur av einum gistingarhúsi. Avgjørt var tí at leggja savnið í kjallaranum á gistingarhúsinum. Nakrir av bygningslutunum eru teir elstu, sum funnir eru í Íslandi. Savnið ímyndar gomlu livikorini hjá íslendingum. Frílandssavnið, ella Árbæjarsafn, sum tað eitur á íslendskum, ið liggur vit útkantin av býnum, er eisini áhugavert at vitja. Hetta eru gomul og eldri hús, ið eru flutt frá ymsum støðum í landinum til Reykjavíkar. Eitt annað er Náttúrufræðistofnum Íslands (natúrsøguligt savn), ið millum annað sýnir fram ein útstappaðan gorfugl. Sum flestum kunnugt, er hesin fuglur útdeyður.



*Eisini ráðhúsið í Reykjavík, sum varð tikið nýtslu í 1992, verður nógv brúkt til listaframsýningar*


























